# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Løgtingið hevur svikið Kringvarpið

Tað vóru tung boð, sum nakrir av starvsfeløgum okkara í Kringvarpinum fingu í morgun, tá hóttanirnar um uppsagnir í Kringvarpi Føroya gjørdust veruleiki.

Hóast tað kann tykjast løgið, at tað so brádliga fór at skorta fíggjarliga hjá Kringvarpinum, so er tað ein sannroynd, at politiski myndugleikin als ikki hevur røkt sínar skyldur yvir fyri Kringvarpi Føroya.

Sjálvandi eiga vit at hava ein góðan, óheftan almennan fjølmiðil, sum Kringvarp Føroya við bæði útvarpsrásum og sjónvarpsrásum. Men skipanin við at lata hesa ábyrgdina út til einstøku húsarhaldini hoyrir ongastaðni heima. Sjálvandi verður tað eitt rámaskríggj, hvørja ferð talan er um at hækka kringvarpsgjaldið, tá Løgtingið hevur valt, at Kringvarpið framhaldandi skal vera ein skattainnkrevji eins og TAKS. Hetta er ikki rímuligt.

Heldur áttu politikararnir at avtikið kringvarpsgjaldið og givið stovninum eina hóskandi játtan á fíggjarlógini. Ikki bara tí at so vórðu byrðarnar býttar javnari yvir allar skattgjaldarar, so sum Tjóðveldi skjýtur upp – men eisini tí, at soleiðis gera vit við allar aðrar almennar stovnar.

Hví skal júst Kringvarpið sjálvt krevja sínar pengar inn? Hví kunnu vit ikki gera tað sama við eitt nú Løgtingið? So kundu tingfólk passandi hækkað hetta gjaldið, hvørja ferð løgtingslønirnar skuldu hækkað. Hetta hevði valla fallið í góða jørð, og hevði sjálvandi heldur ikki verið rímuligt.

Kringvarp Føroya er eisini noytt út í kapping við privatu fjølmiðlarnir um lýsingainntøkur. Hetta er við vælsiglisi frá Løgtinginum – hóast tað í grovan stíl er kappingaravlagandi, at ein almennur stovnur, sum er skattainnkrevji, kann fara út í eina so órættvísa kapping við privatu fjølmiðlarnir, sum verða riknir á 100% haldilsligum grundarlag – og sum eindømi í okkara parti av heiminum – púra uttan eitt oyra í almennum stuðli.

Men politiski viljin sigur, at um trý ár hevur Kringvarpið ongar lýsingarinntøkur. Tí má politiski myndugleikin taka seg um reiggj og fáa skipað viðurskiftini viðvíkjandi Kringvarpinum.

Hesin svarti dagurin hjá Kringvarpi Føroya – og starvsfólkum tess – er í størstan mun eitt symtom upp á politiska undanstøkking heldur enn vánaliga stovnsleiðslu.

**Sosialurin**

## Viðvíkjandi stuðli til umsorgarararbeiði

**KÁRI P. HØJGAARD**
løgtingsmaður



Eftir at hava kannað møguleikan og leita mær ráð hjá serfrøði um at kæra niðanfyri standandi viðgerð er niðurstøðan, at tað ikki letur seg gera. Einasti møguleiki fyri, at stuðulin til dagtilhald kann halda áfram komandi ár er, at broytingaruppskot verður sett fram og samtykt, tá atkvøðugreiðsla verður um fíggjarlógaruppskoti fyri 2009.

Hesin seinasti møguleikin verður royndur.

Seinastu árini hava pensjonistafeløg, kommunur v. m., havt møguleika fyri at søkja um almennan stuðul til sítt virksemi at reka dagtilhald. Seinastu tvey árini, hava tey, sum søktu og uppfyltu treytirnar, fingið játtað stuðul upp til 70% av sínum virksemi.

Eisini í ár var almenn lýsing í bløðunum ið segði frá, at møguleiki var fyri at søkja um stuðul til dagtilhald, av játtanini til umsorgarararbeiði. Seinasta ræumstundis freist at lata umsóknina inn var 1. september 2008.

Kommunur, eldra- og pensjónistafeløg, sum uppfyltu ásettu krøvini í lýsingini, hava enn einaferð søkt um stuðul í góðari trúgv og við grundaðari vón, at tey í minsta lagi fóru at fáa somu peningaupphædd játtaða fyri 2009, sum tey higartil hava fingið. Men soleiðis skuldi ikki verða.

Fríggjadagin 12. desember vórðu trý uppskot samtykt, ið skerja fíggjarvánirnar og gerandisdagin hjá pensjónistunum. Løgtingsmál **nr. 44/2008** avtøka av almennum stuðli til dagtilhald, **nr. 45** skerjing av stuðli til heilivág og **nr. 46** lækkað prístalsviðgerð av viðbótini frá 4 niður í 3%. Øll hesi uppskotini geva eina samlaða sparing fyri landskassan áleið áleið 9,6 mió.

Viðgerðin gekk óvanliga skjótt. Landstýrið legði málið fram 3. desember, eftir 1. viðgerð 10. desember bleiv málið beint í nevnd. Trivnaðarnevndin helt ein fund 11. desember, eingin varð innkallaður og álitið bleiv skrivað sama dag. 12 desember varð 2. og 3. viðgerð av lógarbroytingunum, tí vikið varð frá øllum tíðarfreistum. Uppskotini blivu samtykt við øllum atkvøðunum frá uppmøttu løgtingslimum samgongunar og endaliga avgreidd frá løgtinginum fríggjadagin..

Føroya Løgting er hægsta vald. Tí áliggur tað okkum at umsita tað vald, okkum er litið til, við ábyrgd, nærlagni, skynsemi, umhugsni og virðing, mótvegis øllum landsins borgarum.

Lógin verður lýst tvær vikur áðrenn árslok at koma í gildi á nýggjárinum. Hava eldra- og pensjónistafeløgini, ið higartil hava rikið dagtilhald grundað á almenna stuðulin, ábyrgdina av, at uppsagnarløn til løntar leiðarar og starvsfólk verður goldin í uppsagnartíðini ?

Undir orðaskiftinum kom fram, at kommunurnar nú skulu yvirtaka uppgávuna at reka dagtilhaldini. Sambært kommunustýrislógini skal kommunan lata inn fíggjarætlan fyri 2009 og skal hendan vera Innlendismálaráðnum í hendi áðrenn 1. desember. Eingin kommuna í landinum hevur av hesi orsøk havt møguleikan, at hava hesa útreiðslu við í rakstrinum fyri komandi ár.

Greitt ábyrgdarbýti skal verða millum land og kommunur. Vit hava kommunalt sjálvstýri, og tá uppgávur verða fluttar frá land til kommunu, eiga samráðingar at verða um kostnaðarbýti, áðrenn ætlanin verður framd.

Kann landstýriskvinnan í Almannamálum gjøgnum løgtingið áleggja kommununum hesa óvæntaðu eykaútreiðslu, uttan at spyrja kommunurnar ?

Hvat hendir um kommunurnar siga nei?

Mín niðurstøða er, at øll sum hava søkt um stuðul av játtanini til umsorgarararbeiði fyri 2009 eru hildin fyri spott, tí tey hava søkt um stuðul undir skeivum fortreytum.

Somuleiðis hevur kommunala sjálvstýri fingið eitt skot fyri bógvin, tí kommununar nú fáa at vita, at bólturin liggur hjá teimum, hóast tær als ikki hava leikt við í dystinum.

## Landsverk fekk eingi boð um salting

**LANDSVERK**

Í eini grein í Sosialinum týsdagin 25. november um ferðsluóhapp í Hósvík mánakvøldið 24. november er skeivt uppáhald um Landsverk. Í greinini stendur skrivað: “Landsverk vildi ikki salta í gjárkvøldið, men fólk frá Sunda kommunu, ið komu á staðið, valdu sjálvboðin at salta landsvegin á hesum strekkinum til tess at fyribyrgja eini størri vanlukku.”

Hetta er skeivt. Landsverk hevur kannað málið gjølla og er komið fram til, at Landsverk hevði ikki fingið nøkur boð frá løgregluni ella øðrum um ferðsluóhappini í Hósvík og var ei heldur biðið um at fara út at salta hetta strekkið. Í Hósvík var ein saltbilur hjá kommununi, og var tí ikki neyðugt at senda boð eftir Landsverki.

Vetrarhaldið á Landsverki er skipað soleiðis, at landsvegirnir verða hildnir farbarir millum kl.07.00 og 21.00 yrkadagar og millum klokkan 08.00 og 21.00 sunnu- og halgidagar. Tó verður í serstøkum førum arbeitt longri, eitt nú ísv. neyðsynjarørindi og annað.

Landsverk roynir tó altíð at hava so góða kunning um koyrilíkindi sum gjørligt, so ferðslan kann tillaga seg umstøðunum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.